


www.oljan.fo

**Jan Müller** 10 - 11 - 2011

# 30 føroyingar til arbeiðis í kinesisku oljuvinnuni

Ein spennandi søga - føroyskir handverkarar byggja kinesiskar boripallar, sum norðmenn leiga til m.a. at bora í Føroyum. Pam Offshore Seinni í hesum mánaðinum fara umleið 10 føroyskir handverkarar til Kina at arbeiða í oljuvinnuni har. Talan er um sveisarar, elektrikarar og eisini ein projektleiðara. Mouritz Mohr, stjóri í Pam Offshore sigur við oljan.fo, at avtala er nú gjørd um at senda fólk úr Føroyum til Kina. Teirra uppgáva verður at liðugtgera ein spildurnýggjan boripall, sum seinast í hesum árinum byrjar longu ferðina frá kinesisku skipasmiðjuni til Noregs, har pallurin er leigaður av Statoil. Mouritz Mohr sigur víðari, at tey fara at senda 18 føroyskar handverkarar aftrat til Kina seinni. Hann fegnast um avtaluna, sum dótturfelagið hjá MEST, Pam Offsshore hevur gjørt við norska fyritøku, ið aftur hevur sáttmála við kinesisku fyritøkuna, ið byggir boripallarnar. Frammanundan leigar Pam stórt tal av føroyskum handverkarum út til uppgávur í norsku oljuvinnuni. Onkuntíð hevur talið verið omanfyri 100, í løtuni er tað umleið 55, men stjórin í Pam vónar og væntar, at talið fer at økjast aftur. Sum oljan.fo skilur, so skulu føroyingarnir vera við til at gera tann næsta av fleiri nýggjum boripallum lidnan. Pallurin eitur Cosl Innovater og er hann av sama slag sum Cosl Pioneer, ið var tann fyrsti av sínum slag, sum kinverjar bygdu fyri umleið einum ári síðani. Vert er at leggja til merkis, at tann pallurin - Cosl Pioneer - kemur til Føroya at bora í apríl næsta ár. So ein kann siga, at her er veruliga talan um eitt føroyskt-norskt-kinverskt samband, ið vil nakað - tvørtur um landamørk. Sama fyritøkan, sum føroyingar nú skulu arbeiða fyri, hevur leigað tann fyrsta av sínum pallum til Statoil, og skal hesin bora við Føroyar næsta ár. Cosl Innovater, sum føroyingar nú skulu til at gera lidnan á skipasmiðju í Kina, varð doyptur nú um dagarnar. Eftir henda kemur enn ein pallur av sama slag, sum eisini endar í Noregi. Kinverjar eru veruliga

farnir at kappast á oljupallmarknaðinum og hava valt sær Noreg sum landið, har teir vilja royna sínar pallar, ikki minst tí, at júst Noreg er tað landið, sum setir strangastu krøvini til trygd oa. Tann fyrsti pallurin hjá Cosl fyritøkuni, Cosl Pioneer, er júst royndur í norskum sjógvi og eru skoðsmálini sera góð. Talan er um ein flótandi boripall, sum er sera vælegnaður at bora á umleið 500 metra dýpi. Staðið, har Statoil í næsta ár setir borin í á føroyska landgrunninum, er millum 400 og 500 metrar. Sostatt er hann sum skræddaraseymaður til ta uppgávuna. Tað er Cosl Drilling Europe, sum er eitt dótturfelag hjá móðurfelagnum Cosl í Kina, sum eigur boripallarnar. Mynd - Cosl Innovater, sum føroyskir handverkarar skulu vera við til at gera lidnan í Kina. Hann er av júst sama slag sum tann pallurin, ið Statoil hevur leigað til at bora við Føroyar næsta ár. Mouritz Mohr, stjóri her saman við Anju Jacobsen, dagliga leiðaranum á PAM Offshore á oljumessu í Aberdeen. Mynd oljan.fo/Jan Müller